Fylgiskjal 10

ETISKA RÁÐIÐ

Ummælisskriv til uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um revsing (Revsilógin)

Etiska ráðið takkar fyri møguleikan at koma við viðmerkingum til lógaruppskotið um broyting í løgtingslóg um revsing. Etiska ráðið metir at lógaruppskotið er gott, eins og ráðið metur at tað er týdningarmikið at gera eina slíka dagføring. Etiska ráðið hevur kortini nakrar viðmerkingar til lógaruppskotið.

Viðvíkjandi § 229

Tað er gott at ein við orðingini um "snildi" í § 229 tekur hædd fyri, at ein persónur letst at vera onkur annar, enn persónurin veruliga er. Tíverri er hetta sera vanligt, og kann hava stóra ávirkan á, hvørt ein persónur hevur álit á tí, sum viðkomandi samskiftir við ella ikki. Etiskt kann ein tó seta spurnartekin við, hvørt tað er munur á, tá fólk latast at vera ein ispunnin persónur, og tá fólk latast at vera ein ávísur veruligur persónur. Hetta kemur tíverri eisini fyri, og kann hava sera álvarsligar avleiðingar fyri tann persónin, hvørs samleiki verður nýttur at grooma onnur. Ein kann tí umhugsa hvørt hetta eru skerpandi umstøður.

Hetta sama ger seg í uppaftur størri mun galdandi, um groomarin letst at vera t.d. ein lærari hjá næminginum ella onkur annar persónur, ið hevur líknandi autoritets/álitis støðu í mun til hin órættaða. Lógin staðfestur at tað er skerpandi, um ein tílíkur persónur við ábyrgd av tí grommaða er tann, ið groomar, men hvussu er, um ein groomari letst at vera ein tílíkur persónur? Tá ger tað seg bæði galdandi at ein brúkar sambandið millum hin órættaða og samleikan groomarin átekur sær, eins og tað eisini her kann hava serstakliga álvarsligar avleiðingar fyri tann, hvørs samleiki er brúktur.

Viðvíkjandi 1.3 – Endamál við uppskotinum

Etiska ráðið metir at tað er serstakliga gott, at viðmerkingarnar til lógaruppskotið staðfesta at:

"Samstundis verður gjørt greitt fyri børn og ung, at tað ongantíð er teirra skyld, at tey eru fyri kynsligum ágangi."

Hetta er ein boðskapur, sum tað hevur stóran týdning at fáa út til øll. Tað er ósannlíkt at børn og ung lesa lógaruppskotið, og tí hevði tað verið serstakliga gott, um ein leggur orku í at tryggja sær, at tá lógaruppskotið er samtykt – og í tilgongdini upp til at samtykkja tað – so kemur hesin boðskapurin væl og virðiliga fram til tey ungu.

ETISKA RÁÐIÐ

Tað kann sigast sum heild um lógaruppskotið, at tað er týdningarmikið at kunna børn og ung ordiliga um broyttu lóggávuna. Bæði so tey vita hvørji rættindi og hvørja verju tey hava, men eisini tí har eru dømi um børn og ung, sum gera seg talgilt inn á onnur børn og ung.

Viðvíkjandi Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek

Í viðmerkingunum verður staðfest, at støða teirra, ið bera brek, má metast at vera óbroytt við hesum lógaruppskotinum. Tað er ivasamt hvørt hetta er heilt rætt. Fólk, ið bera brek, eru ein tann bólkurin í samfelagnum, sum upplivir mest av kynsligum ágangi. Hetta ger seg bæði galdandi tá um ræður kropslig, sálarlig og kognitiv brek. Fólk, ið bera brek eru ofta í sera viðbreknum støðum, ið eitt nú sæst aftur í, at fólk, ið bera brek, oftari uppliva grooming enn onnur. Títtleikin av talgildum ágangi er somuleiðis høgur hjá fólki, ið bera brek. Tí er hetta eitt lógaruppskot, sum betrar um umstøðurnar hjá fólki, ið bera brek – serliga vísandi til grein 16 í sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

Uppskotið kann tó eisini hava minni góðar avleiðingar við sær, tá um ræður staðfestingina av, at ósketni ikki er ein orsøk til, at ein sleppur undan revsing. Eins og tað er staðfest at fólk, ið bera brek, hava munandi størri sannlíkindi fyri at uppliva grooming og kynsligan ágang, so er tað eisini staðfest, at serliga fólk, ið hava kognitiv og summi sløg av sálarligum brekum, væl kunnu hava ringt við at meta um, hvussu gomul fólk eru, nær tað er passandi at siga og gera ting við onnur (serliga tá tey eru á talgildum pallum), og at meta um hvørt eitthvørt er satt ella ikki. Lógaruppskotið kann tískil ávirka hendan bólkin av fólki, ið bera brek, neiliga, í og við at tey eru í størri vanda enn onnur fyri at bróta hesa lógina av ósketni.

Eigur § 229 at víðkast?

Sum heild kann ein eisini reisa spurningin, hvørt § 229 átti at verið víðkað, soleiðis at hon ikki einans fevnir um grooming av fólki yngri enn 18 ár, men eisini fólki, sum eru í serliga viðbreknum støðum. Kjakið í Føroyum hevur verið merkt av, at fatanin tykist at vera, at grooming er nakað, sum vaksin brúka móti børnum. Hetta er tó ikki rætt. Grooming kemur eisini ofta fyri tá um ræður aðrar bólkar – og kann í roynd og veru raka øll.

Serliga fólk, sum hava brek, ið ávirka teirra kognitivu førleikar, eru í eini sera viðbreknari støðu alt lívið. Uttanlands hevur ein staðfest, at tey eru í vanda fyri grooming óansæð aldur. Spurningurin er, hvørt tað ikki hevði verið rættast, at hesin bólkurin av fólki eisini onkursvegna verður fevndur av § 229.

ETISKA RÁÐIÐ

Ein kann somuleiðis seta spurnartekin við, hvørt ein skal víðka § 229 til at fevna um aðrar viðbreknar bólkar av fólki, men tá kann tað verða ringt at gera av júst hvar ein setur markið. Flest øll brek hava við sær, at fólk eru í størri vanda fyri ágangi og grooming enn annars. Hetta tí brekini ofta gera so at fólk eru í eini meira viðbreknari støðu, og tí eru lættari at grooma og misnýta. Tað sama kann tó sigast um fólk, sum eru fíggjarliga sperd, eru støk foreldur, eru sosialt isoleraði og so framvegis, ið eisini bæði økir um sannlíkindini fyri ágangi, og ger tað lættari at grooma og gera seg inn á hesar bólkarnar. Etiska ráðið hevur tí ringt við at meta um, hvar ein skal seta markið, um ein byrjar at fevna um bólkar, sum hava aðrar avbjóðingar enn kognitivar.

Ein loysn kundi verið at sagt fólk, ið bera brek sum heild eru fevnd av lógini, og ein onnur loysn kundi verið at sagt fólk, sum eru í eini serliga viðbreknari støðu, tó at hetta helst verður torførari at arbeiða við. Ein onnur loysn kundi verið at púra avtikið markið á at ein skal vera yngri enn 18 ár. Tó at grooming er vanligast tá um ræður viðbreknar bólkar, so er grooming sum sagt nakað øll kunnu uppliva – serliga í støðum, har ein persónur hevur meira vald enn onnur. Kendastu dømini um hetta eru helst tá um ræður trafficking og grooming á ellis- ella røktarheimum, men tílík tilvenjing av fólki kann henda í so at siga øllum støðum. Spurningurin er tí, hvørt tað ikki hevði verið rættast, at kriminaliserað grooming av øllum aldursbólkum. Er støðan í Føroyum sum aðrastaðni, so verður hetta nokk serliga viðkomandi í mun til børn, ung og fólk, ið eru serliga viðbrekin, men tað er nokk rættast um øll hava hesa verju.

Onnur atlit

Etiska ráðið hevur ringt við at meta um, hvørt ásetingin um ósketni er góð ella ikki. Á teirri eini síðuni er tað ómetaliga gott, at ein fær staðfest, at tað ongantíð eru børn ella ung, sum hava skyldina í, at tey eru fyri ágangi. Á hini síðuni eru tað avgjørt eisini nógvar støður, har tað er ógjørligt hjá einum persóni at vita, at tann ein samskiftir við er barn ella ungur. Tað er púra vanligt at børn og ung lúgva um sín aldur á alnótini. Serliga at tey lúgva um, at tey eru eldri enn tey veruliga eru. Tí eru har avgjørt støður, har tað er ógjørligt hjá einum persóni at vita, at tann ein samskiftir við er yngri enn tað, sum viðkomandi sigur. Tó at tað er væl meira sjáldsamt enn dømini um at tilkomin fólk fremja kynsligan ágang á ung, so eru eisini dømi um at ung lumpa tilkomin fólk, fyri so at kroysta tey t.d. fíggjarliga. Mest óhepnu dømini um hetta uttanlands hava snúð seg um tilkomin fólk, ið bera kognitiv brek. Í slíkari støðu kann tað vera ringt at argumentera fyri, at ein persónur skal revsast, og tað kann vera ivasamt, hvørt ósketni og at tilvita gera seg talgilt inn á ein persón skulu javnstillast. Tó loysir møguleikin fyri at revsingin tá gerst linari í ávísan mun hesa tvístøðu. Tá um ræður grooming er ein máti at sleppa undan tvístøðuni við, hvørt ósketni um veruliga aldurin er ein legitim umbering ella ikki, at ein kemur við eini orðing um viðbreknar bólkar av fólki, ella letur upp fyri at

ETISKA RÁÐIÐ

grooming av øllum fólkum kann revsast, óansæð aldur. Ger ein tað er grooming skeiv, óansæð um viðkomandi er 17 ella 18 ár.

Ein kann eisini umhugsa, nú ein ger slíka lóg um talgildan kynsligan ágang, at koma inn á onnur sløg av talgildum kynsligum ágangi enn tað, sum ein nevnir her. Spurningurin er hvørt ein t.d. skal hava betri vernd, tá um ræður deepfakes, har ein fær tað til at síggja út so um, at fólk hava kynsliga samlegu, nøkta seg sjálvan kynsliga, eru nakin ella líknandi. Tá ein á slíkan hátt brúkar ímyndina av kroppinum hjá øðrum uttan loyvi, so er tað ein reellur spurningur, hvørt tað eisini er at gera seg kynsliga inn á ein persón. Ein kann ógvuliga lættliga ímynda sær eina støðu, har slíkar myndir saman við søgum ferðast runt um t.d. ein næming í framhaldsdeildini ella einum miðnámsskúla, og hevur vanlukkuligar avleiðingar fyri trivna og sálarheilsu hjá tí næminginum.

Samanumtikið

Samanumtikið metir Etiska ráðið greitt at lógaruppskotið er gott, og er ein greið betran av núverandi rættarstøðu. Tær viðmerkingarnar Etiska ráðið er komið fram til, snúgva seg einamest um at leggja afturat lógaruppskotinum, og hvørt bólkurin, sum verður vardur móti grooming, er ov avmarkaður.

Tað er somuleiðis vert at leggja dent á, at tað er gott at lógaruppskotið og viðmerkingarnar eru lættar at lesa og ikki krevja nevniverda servitan.